betri banki

# Stovna Bassakontu

**Tá tú handar Betri Banka skjalið, minst til:**
Navnabræv, p-tals váttan og bústaðarváttan. Um barnið hevur pass, er bert neyðugt við passi og p-tals váttan.

## 1. Samleikaupplýsingar

*Upplýsingar um barnið:*

| | |
|---|---|
| Navn | P-tal/passnummar |
| Gøtunavn og nr. | Postnr. og bygd/býur |

*Upplýsingar um foreldur ella verjar:*

| | |
|---|---|
| Navn | P-tal |
| Navn | P-tal |

## 2. Tjóðskapur

| | |
|---|---|
| Tjóðskapur | Føðiland og býur/bygd |
| Hevur barnið *TIN-nr. frá øðrum londum? | |

* *TIN nummar er samleikanummar t.d. í DK er tað CPR-nr. Tað skal skjalprógvast t.d. við avriti av útlendskum passi*

## 3. Nærstandandi við politiskt útsettan persón

*Við politiskt útsettan persón er at skilja persónur, ið hevur ella hevur havt eina hægri almenna funktión, t.d. tinglimur, stjørnarlimur, floksformaður e.t.*

| |
|---|
| Er barnið nærstandandi við ein politiskt útsettan persón? Ja ☐ Nei ☐ |
| Um ja, hvør er politiskt útsetti persónurin, og hvat er tilknýtið? |

## 4. Endamál við bankaviðurskiftinum

☐ Uppsparing

Annað endamál:

## 5. Virkisvav

*Virkisvav snýr seg um, hvat kemur inn, og hvat fer av kontum eitt vanligt ár*. Útfyll eftir førimuni teir teigar, sum eru viðkomandi.

**Flytingar:**

Inn á Bassakontu ____________ Aðra kontu ____________ Samlað upphædd í kr. ____________________________

**Inngjøld í reiðum peningi:**

Gávur ____________ Annað ____________ Samlað upphædd í kr. ____________________________

Væntað árlig inngjøld í reiðum peningi *(nøgd)* ____________ Største einstaka inngjald í reiðum peningi *(einstøk upphædd)* ____________

**Væntaðar árligar flytingar úr útlandinum:**

| Frá landi | Tal av flytingum | Største einstaka upphædd í DKK | Hví verður flytingin framd? (t.d. gáva, familja o.a.) |
|---|---|---|---|
| | | | |

## 6. Kundaváttan

Eg vátti við hesum
- at tær upplýsingar, ið eg havi latið Betri Banka P/F eru rættar og fullfíggjaðar
- at eg havi havt høvi at gera meg kunnugan við treytirnar fyri Bassakontu, sum eru at finna á næstu síðu í hesum skjali
- at eg havi góðtikið "Vanligar viðskiftatreytir hjá Betri Banka P/F", sum eru at finna á heimasíðu bankans

*Staður og dagfesting* *Undirskrift hjá foreldrum/verja*

betri banki

# *Treytir* fyri Bassakontu

- Bassakontan verður stovnað av stovnaranum, sum hevur undirskrivað stovningarskjalið; vanliga foreldur ella verji hjá barninum.
- Bassakontan verður stovnað í navni barnsins, sum er kontuánari.
- Bassakontan er bundin frá tí degi, at kontan er stovnað, og til kontuánarin fyllir 18 ár.
- Hvørki stovnari, kontuánari, gevari ella annar triðipartur kann uppsiga ella flyta peningin av kontuni, áðrenn kontuánarin hevur fylt 18 ár.
- Innistandandi á Bassakontuni er undandrigið ræði kontuánarans, áðrenn kontuánarin hevur fylt 18 ár.
- Innistandandi á Bassakontu kann setast í virðisbrøv, umvegis tilknýtta virðisbrævagoymslu.
- Innistandandi kann ikki avhendast ella veðsetast.
- Um serlig viðurskifti gerast galdandi, kann Betri Banki uppsiga avtaluna við 6 mánaða freist. Serlig viðurskifti kunnu t.d. vera um viðkomandi lóggáva broytist, sum ger, at Bassakontan ikki longur lýkur lógarkrøv; um bankin broytir fortreytirnar fyri Bassakontuna ella onnur serlig viðurskifti.
- Stovnarin av Bassakontuni kann ikki áleggja bankanum aðrar treytir enn tær, sum eru nevndar í hesi avtalu.
- Tá kontuánarin fyllir 18 ár, verður kontan broytt til Uppsparingarkonta Ung, sum í løtuni hevur eina uppsagnartíð á 3 mánaðir. Kontuánarin kann tó flyta innistandandi á aðra kontu uttan dekort í ein mánað, frá tí, at hann/hon fyllir 18 ár.
- Henda avtala er at rokna sum sertreytir samanborið við “Vanligar viðskiftatreytir í Betri Banka P/F”. Har viðurskifti ikki eru fevnd av hesi avtalu, eru “Vanligar viðskiftatreytir í Betri Banka P/F” galdandi.
- Henda avtala fær gildi, tá hon verður undirskrivað av stovnaranum.